# Kaos á ferjuleguni í Klaksvík

**Hóast Strandfaraskip Landsins í nýggju ferðaætlanini hevur økt um túratalið hjá Dúgvuni, so megnar hon enn ikki at nøkta tann tørvin, sum seinastu tíðina hevur stungið seg upp í Klaksvík**

SAMFERÐSLA
*Ragnhild Ellingsgaard*



*Myndin er tikin ein vanligan hósdag í Klaksvík, men er einki undantak frá gerandisdøgunum við hópin av bíðirøðum á ferjuleguni. Fleiri av bilunum standa enntá og bíða á vegnum, tí ikki er pláss fyri teimum í røðunum, sum eru uppmerktar á ferjuleguni sjálvari*

**Klaksvík:** Fyri stuttum gav Strandfaraskip Landsins út eina nýggja ferðaætlan, har túratalið hjá Dúgvuni um Leirvíksfjørð varð økt við fleiri túrum. Hetta varð gjørt, tí fyrrverandi túratalið ikki megnaði at nøkta tørvin hjá teimum, sum vildu um Leirvíksfjørð, og ofta stóðu fleiri røðir av bilum eftir á ferjuleguni og sloppu bilarnir ikki við yvirum.

Væntað varð, at økta túratalið fór at betra um hendan trupulleika, men enn sást tó lítið til nakra munandi broyting.

### Reint kaos

Enn er tað gerandiskostur hjá klaksvíkingum at síggja fleiri røðir av bilum standa eftir á ferjuleguni, og summar dagar røkkur røðin enntá niðan á vegin, har hon tarnar ferðsluni, sum annars skuldi koyrt eftir vegnum, sum er partur av høvuðsæðrini í Klaksvík.

Í bíðandi røðunum eru eisini fleiri av teim størru bilunum, sum flyta flutning frá virkjunum í størsta fiskivinnubýnum í Føroyum til aðrar oyggjar. Hesir taka nógv pláss, og kann vera torført at sleppa uttan um teir, tá teir standa og bíða á vegnum.

Hetta er ein støða, sum gongur nærum øllum klaksvíkingum og øðrum ferðandi í býnum rættiliga nær, og tey flestu undrast yvir, at eingin loysn verður funnin viðvíkjandi trupulleikanum.

### Rakar vinnuna

Trupulleikin rakar tó ikki einans vanliga borgaran. Vinnan í Klaksvík ávirkast eisini í stóran mun av kaosinum, sum stingur sum upp á ferjuleguni. Serliga fiskivinnan, sum skal hava vøru flutta úr býnum, merkir nógv til trupulleikan. Teir flestu stóru bilarnir innihalda allir ráan fisk, sum skal til víðari framleiðslu aðrastaðni í landinum.

Men stóru bilarnir noyðast ofta at bíða fleiri tímar á ferjuleguni, áðrenn teir sleppa umborð, og samstundis bíða kundar uttan fyri Klaksvík eftir vøruni, ið bilarnir hava.

Hetta førir í fleiri førum til framleiðslusteðg á virkjunum, og soleiðis førir hetta til ein beinleiðis peningamiss hjá virkjunum.

Virkini í Klaksvík merkja eisini sviðan av støðuni, tí trupulleikin finst ikki einans í Klaksvík.

Á ferjuleguni í Leirvík eru ofta eins langar røðir at finna, og her mugu bilførarar bíða í fleiri tímar, áðrenn teir sleppa til Klaksvíkar við fiski til víðari framleiðslu.

Hetta førir alt við sær, at vinnan í Klaksvík má av við eina rúgvu av bíðipeningi. Onkur hevur ført fram, at vinnan her á staðnum má vera heimsins dugnaligasta, tá tað snýr seg um at fáa slíkan eykakostnað afturat dýra framleiðslukostnaðinum at bera til í samband við flutningin til meginøkið, tí ikki tykist samband við meginøkið at kunna gerast øðrvísi enn umvegis Leirvíksfjørð.

### Fyribils eingin loysn

Hóast trupulleikin er lýstur fleiri ferðir umvegis fjølmiðlar í landinum, so er enn eingin loysn funnin viðvíkjandi hesum.

Ein loysn kundi verið at sett Ternuna at hjálpa Dúgvuni á leiðini, men fyribils er Ternan bundin av leiðini um Vestmannasund. Hetta er tó ein kostnaðarmikil loysn, og enn er ikki fingið greiði á, um veruleiki spyrst úr hesum.

Onkur hevur eisini sett fram spurningin, um ikki okkurt annað og betur skip enn Ternan skuldi verið sett til leiðina, men eisini hesin spurningur stendur ósvaraður í dag.

So fyribils mugu vinnan og fólk annars í Klaksvík brynja seg við toli, og bíða eftir, at myndugleikarnir finna onkra loysn viðvíkjandi trupulleikanum.

Vinnan í Klaksvík:

# Ein ótolandi støða

**Sum heild er vinnan í Klaksvík samd um, at støðan í dag við longu bíðirøðunum á ferjuleguni als ikki kann góðtakast. Øll virkini, sum fáast við fisk, merkja sviðan á ein ella annan hátt, og tí má ein loysn finnast skjótast gjørligt. Sosialurin hevur hitt nøkur av virkjunum fyri at vita, í hvussu stóran mun støðan merkist hjá hvørjum einstøkum**

SAMFERÐSLA
*Ragnhild Ellingsgaard*



*P/F Kósin: Arbeiðsfólkini missa fleiri tímalønir*

**Pure Water:**
**- Førir til framleiðslusteðg**

– Longu bíðirøðirnar eru ein trupulleiki, sum Føroya størsti fiskivinnubýur als ikki kann góðtaka. Her mugu avgjørt broytingar gerast, soleiðis at túrarnir um Leirvíksfjørð hóska bæði til vinnulívið og aktivitetir annars her í býnum, sigur Eyðbjørn Poulsen, stjóri.

Hann leggur afturat, at um virkið ikki fær fiskin til tíðina, so førir hetta til ein framleiðslusteðg, sum víðari kostar virkinum pening. Men trupulleikin er tó betraður, síðani Strandferðslan økti um túratalið um Leirvíksfjørðin, heldur Eyðbjørn.

– Serliga tann seinasti túrurin kemur okkum til góðar, tí tá eru ikki so nógv fólk við, og tí er meir pláss fyri vøruni. Vøru, sum virkið skal brúka næsta morgunin.

**P/F Kósin:**
**- Viðurskiftini leggjast til rættis**

Adrian Dalsá, stjóri á P/F Kósin, greiðir frá, størsti trupulleikin hjá teimum er, at fiskur úr Eysturoynni ikki sleppur við Dúgvuni yvirum í nóg góðari tíð. Tí má virkið ofta senda arbeiðsfólkið til hús í nakrar tímar, ella tey kvetta arbeiðsdagin fullkomiliga.

– Hetta merkist ikki einans hjá virkinum, men arbeiðsfólkini missa jú eisini nakrar tímalønir, sigur Adrian.

Heldur ikki Adrian heldur, at støðan kann góðtakast.

– Fiskivinnan skapar peningin her á landi, og tí mugu viðurskiftini rundan um vinnuna eisini leggjast soleiðis til rættis, at alt fungerar. Hetta er uppgávan hjá myndugleikunum, sum mugu taka sær um reiggj, sigur hann.

**Fiskamarknaður Føroya:**
**– Ávirkar prísin**

Kristjan Fríðrik Olsen, virkisleiðari, greiðir frá, at kundin sjálvur avheintar fiskin á Fiskamarknaðinum. Tá sølan so er liðug, skal kundin sjálvandi hava fiskin upp á pláss beinanvegin, meðan fiskurin enn er frískur. Og tá kemur meir enn so fyri, at teir renna seg inn í trupulleikar við samferðsluni, og mugu ofta bíða upp til tveir túrar, áðrenn teir sleppa víðari. Hetta førir so aftur við sær, at fiskurin kemur ov seint út á virkini, og kunnu tey tí ikki fara undir nakra framleiðslu fyrr enn næsta dagin.

– Hetta ávirkar aftur prísin. Tá kundin veit, at trupult kann vera at fáa fiskin fram, so vil kundin sjálvandi geva minni fyri fiskin, sigur Kristjan Fríðrik. Hann sigur víðari, at prísurin serliga ávirkast av hesum upp móti vikuskiftinum.

Tó heldur hann, at økta túratalið hjá Strandferðsluni hevur betrað munandi um støðuna, men tó er hetta ikki nøktandi enn.

– Kundin veit, at tað kann verða trupult at fáa fiskin fram til tíðina, og tí letur hann oftani vera við at keyoa. Betri sambandið verður um Leirvíksfjørð, meir selja vit. Hetta setur so aftur størri trýst á vinnuna, greiðir hann frá.

Tí heldur hann eisini, at torført er at tosa um ítøkiligan peninga- ella arbeiðsmiss, men hetta ávirkar í stóran mun og kann als ikki góðtakast.

– Best hevði verið at fingið Vágatunnilin lidnan skótast gjørligt, og síðan sett Ternuna inn at hjálpt Dúgvuni, sigur Kristjan Fríðrik, virkisleiðari á Fiskamarknaði Føroya.



Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni:

# - Neyðugt við langtíðarætlanum

**Á Strandferðsluni eru tey varug við trupulleikan við samferðsluni í Klaksvík, og hava tey eisini kannað, hvørjir møguleikar eru fyri at betra um støðuna**

SAMFERÐSLA
*Ragnhild Ellingsgaard*



*Strandferðslan: Ternan kundi verið ein loysn*

**Klaksvík:**
– Vit hava leingi verið varug við trupulleikan í Klaksvík, og vit hava eisini kannað, hvørjar møguleikar vit hava fyri at betra um støðuna, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni.

Hann greiðir frá, at ein loysn kundi verið at sett Ternuna inn í leiðina, og síðan kundi ferðslan verið sundurskild soleiðis, at Dúgvan tók tann tyngra flutningin, meðan Ternan kundi tikið persónbilar og fólk annars. Men hetta er samstundis ein kostnaðarmikil loysn, og er av í sama vorðin ein politiskur spurningur.

– Men vit hava so sent uppskotið víðari til avvarðandi myndugleikar. Hervið hava vit gjørt alt, sum vit kunnu gera, sigur Reidar Nónfjall.

Fyri nøkrum árum síðani røkti Ternan leiðina um Leirvíksfjørð einsamøll, men trupulleikar stungu seg eisini upp við hesi loysnini.

– Tá hugsaðu vit frameftir og uppgraderaðu Dúgvuna, soleiðis at hon kundi setast inn í leiðina ístaðin, greiðir Reidar frá.

Hetta var ein sera kostnaðarmikil íløga, sum ikki varð eins væl móttikin av øllum. Onkur spurdi, um hetta veruligt var eitt neyðugt stig at taka.

– Gongdin tey seinastu árini hevur tó víst okkum, at avgerðin var røtt. Vinnulívið í Føroyum hevur staðið í blóma, og hetta veksur eisini um samferðslutrýstið kring landið, sigur Reidar.

Hann greiðir víðari frá, at uppgávan hjá Strandferðsluni er fyrst og fremst at binda oyggjarnar saman, men hetta kostar samstundis nógvan pening.

Tey seinastu árini eru umstøðurnar í Føroyum eisini munandi betraðar, men trupulleikin er bara, at øll flutningsamboðini gerast gomul samstundis. Tí kann tað virka sum ein øgilig íløga hjá politisku myndugleikunum at finna fleiri nýggj flutningsamboð um somu tíð

– Tí er neyðugt við eini langtíðarætlan, eisini frá tí politisku síðuni, heldur stjórin á Strandferðsluni.




Myndugleikar í Klaksvík

# – Trupult at finna nakra loysn

**Longu bíðirøðirnar á ferjuleguni røkka summar dagar heilt niðan á vegin, har teir tarna ferðsluni, sum annars koyrir í býnum. Hetta kann til tíðir síggja vandamikið út, og er hetta ein støða, sum klaksvíkingar als ikki kunnu góðtaka**

SAMFERÐSLA
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:**
Hóast mong hava gjørt vart við trupulleikan, ið stendst av longu bíðirøðunum, so er enn eingin loysn funnin viðvíkjandi longu bíðirøðunum, sum røkka heilt niðan á vegin, sum annars er ein partur av høvuðsæðrini í vegakervinum í Klaksvík.

### Ørkymlandi støða

Tekniska Deildin hjá Klaksvíkar Kommunu hevur til uppgávu at uppmerkja básar til bíðirøðirnar á ferjuleguni. Men sum nú er, rúma hesir básar als ikki allari ferðsluni.

– Trupulleikin er einans, at vit hava einki annað pláss, har vit kunnu uppmerkja fleiri básar, greiðir Dávur Winther, starvsfólk á Teknisku Deild, frá.

Tey eru tó varug við trupulleikan, men halda, at ábyrgdin eisini liggur hjá løgregluni, sum skal skipa fyri, at ferðslan gongur rætt fyri seg.

Á Teknisku Deild eygleyða tey tó trupulleikan við ørkymlaðum eygum.

– Vegurin við ferjuleguna er jú ein høvuðsæðr í býnum, men tá røðirnar røkka heilt niðan á vegin, kunnu vandar standast av ferðsluni. Sum nú er, fáa vit bara ikki loyst trupulleikan, sigur Dávur Winther.

### Halda eyga við ferðsluni

Á løgreglustøðini eru tey eisini varug við trupulleikan, men halda tey, at Klaksvíkar Kommuna átti at gjørt okkurt við hetta.

- Okkara uppgáva er at halda eyga við, at ferðslulógin verður yvirhildin. Men økið á ferjuleguni er alt ov lítið til at rúma allari ferðsluni, og tí gerst alt kaos í bíðirøðunum, sigur Karl Johannesen, løgreglumaður í Klaksvík.

Løgreglan koyrir tó framvið ferjuleguni við jøvnum millumbili, og heldur á tann hátt eyga við ferðsluni.

– Trupulleikin sýnist tó at gerast alsamt størri, og tí er neyðugt at finna eina loysn hesum viðvíkjandi skjótast gjørligt, sigur Karl Johannesen.